HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Mikudagin, 24. februar 2016 kl. 18:00

Á fundinum vóru:	Una Matras, Karin Dahl, Birgir Kass, Bjørghild Djurhuus og Manne Persson
Avboð:	Jógvan Arge
Skrivari:	Birgit Arge

Felags foreldrafundur

Hetta var tann árligi felags foreldrafundurin, sum skuldi byrja kl. 19:00. Skúlastýrið møtti kl. 18:00 at leggja fundin til rættis og gera alt klárt.

Evnið hesaferð var: Talgildi skúlin – ein gongd leið?

Skúlastýrið hevði biðið André Danielsen, lærara og telduvørð í Stranda skúla, og Gitte Klein, varaskúlastjóra í skúlanum við Løgmannabreyt, koma við innleggum umboðandi hvør sítt sjónarhorn.

Fundurin byrjaði við at Birgit Arge, skúlastjóri, bjóðaði vælkomin. Síðan spældi tónleikaholdið í 9. flokki tvey løg.

Una Matras, forkvinna í skúlastýrinum, kunnaði um tað, sum skúlastýrið hevði arbeitt við seinasta árið. Hon nevndi teir fysisku karmarnar, 1. hjálparaskeiðið og heimasíðuna. Tað yvirskipaða málið er skúlagarðurin.

Andre Danielsen helt sítt innlegg, sum var um hvussu tey í Stranda skúla arbeiða við tøknini. Har hevur hvør næmingur sín iPad. Hann greiddi frá, hvussu tey arbeiða og brúka iPaddin.

Eftir ein kaffisteðg tosaði Gitte Klein um t.d. tey árin, sum tøknin hevur á heilan. Hon bygdi sítt innlegg á nógva gransking á økinum.

Síðan var kjak. Stór ósemja tykist at vera millum fyrilestrahaldararnar. Fleiri spurningar komu frá foreldrunum, og tær ymsu meiningarnar komu fram. Eingin niðurstøða var, men tað var heldur ikki ætlanin. Ein sera áhugaverdur fundur um eitt áhugamert evni.

Umleið 70 áhoyrarar vóru komnir til fundin.

Fundurin lokin kl. 21:30